FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingsgrannskoðararnir
Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postrúm 208
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
14. mai. 2009
Mál.: 200600059 / 27
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RR/el

Tygara skriv:

Víst verður til tygara skriv, dagfest 27. mars 2009 um Frágreiðing um Tyrlutænastuna, tygara j. nr. 2005/2005-0342.

Fiskimálaráðið harmast um, at tað tók so langa tíð at svara grannskoðaranum. Orsøkin til at málið kom í drag var, at stórur partur av spurningunum frá landsgrannskoðaranum snúðu seg um upplýsingarnar, ið ikki vóru tøkir í ráðnum. Fyri at kunna svara, var fyrst neyðugt at hava samskifti við Atlantic Airways, sum mátti útvega Fiskimálaráðnum upplýsingarnar. Hetta samskifti gekk striltið, og sum tað framgongur av skrivinum hjá Fiskimálaráðnum 10. juli 2008, so eydnaðist ongantíð Fiskimálaráðnum at útvega allar upplýsingarnar frá Atlantic Airways, sjálvt um nógv samskifti var um hetta.

Bæði sáttmálin hjá Fiskimálaráðnum og tann hjá Vinnumálaráðum við Atlantic Airways um tyrlutænastu eiga at verða gjørdir heilt av nýggjum. Sáttmálarnir er ógreiðir og ikki gjørdir út frá reinum handilsligum sjónarmiðum. Hetta hevur Landsgrannskoðarin eisini víst á fyrr. Upprunaliga var politiskt ynski um, at Atlantic Airways, sum landið átti 100%, skuldi hava uppgávuna. Tí var eingin útbjóðing ella neyv kanning gjørd av, hvussu tílíkir sáttmálar verða gjørdir aðrastaðni.

Atlantic Airways er nú partvís privatiserað, og m.a. av teirri orsøk eins og at sáttmálarnir eru ógreiðir, er neyðugt at endurskoða avtalurnar í sínum heila líki, við tí fyri eyga at fáa tær meiri neyvar og handilsligar.

Eisini eigur at verða umhugsað, um tað er rætt, at Vinnumálaráðið og Fiskimálaráðið hava hvør sín sáttmála um tyrlutænastur.

Ministry of Fisheries
Heykavegur 6 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Fiskimálaráðið hevur sett orku av til at endurskoða sáttmálaviðurskiftini viðv. tyrlutilbúgvingini. Sáttmálin er ikki nakað einfaldur sáttmáli og tí verður roknað við, at tað verður neyvan komið á mál við tilfari til nýggjan sáttmála fyrr enn seint í ár. Núverandi sáttmáli fer úr gildi 31.12.2010. Í hesum sambandi skal verða víst á § 12 í sáttmálanum, har ásett er, hvussu farið verður fram, um sáttmálin skal broytast ella setast úr gildi.

Um løgtingsgrannskoðararnir ynskja fund við Fiskimálaráðið um nevnda mál, møta vit sjálvandi.

Vinarliga

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður

Rógvi Reinert
aðalstjóri